## Úlvur á barr

Barrgestirnir í italienska býnum Viletta Barrea fingu eina heilt øðrvísi náttúruupploiving, tá ein villur úlvur frá nærliggjandi tjóðarlundini smoygdi sær inn á barrina og nápaði sær eina tvíflís av einum borði. Barreigari Giacinto Lorenzo heldur, at svongd í vetrarkuldanum hevur ført til undarliga atburðin hjá úlvinum, og meðan óbodni gesturin tók tað púra róligt, vóru kundarnir í barrini um at gera í buksurnar av ræðslu. – Øll vóru so rædd, at vit stívnaðu í einar fimm minuttir, men úlvurin spákaði bara avstað aftur, sum var einki hent, sigur italski barreigarin, sambært bt.dk



## 14 mia upp á subprime

Subprime-lán hava seinastu mánaðirnar verið einstýðandi við risatap, men fyri fleiri íleggingarfeløg hevur tað hinvegin merkt óhoyrdar inntøkur. Fíggjarblaðið Bloomberg Markets hevur gjørt lista yuvir størstu inntøkurnar av subprime kreppuna, og á einum greiðum fyrsta plássi er stjóraparið John Paulson og Paolo Pellegrini, sum eftir níggju mánaðum hava forvunnið 14,4 milliardir krónur. Strategiskt góð viðmæli til íleggjarar hjá íleggingargrunnum um frammanfyri standandi kreppuna á amerikanska bústaðarmarknaðinum í 2006, hevur hækkað virðið í grunnunum í Paulson & Co við 340% í meðal frá ársskiftinum fram til 28. september, skrivar Børsen.

# Heilsustøðið skal hækka

**Fyribyrgingarráðið skipar í næstum fyri kanning av føroyingum millum 40 og 70 ára aldur. Endamálið er at gera føroyingar meiri tilvitaðar um egna heilsu**

HEILSUKANNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Borgarstjórin var sjálvboðin royndarkanin á tíðindafundinum í Heinesens Húsi gjáramorgunin. Her tosa verkætlanarleiðarin, Malan Egholm, og Heðin Mortensen úrslitið, sum var »beint undir miðal«*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

MARK eitur verkætlanin, sum fyribyrgingarráðið komandi mánaðirnar fer at skipa fyri. Styttingin stendur fyri Motión, Alkohol, Royking og Kost, og er ein umskriving av somu donsku kanningini, sum er stytt KRAM.

Fyribyrgingarráðið hevur sett Maluna Egholm at standa fyri kanningini, og hon sigur, at gransking hevur víst, at lívsfaktorar sum royking, ov lítil motión, vánaligur kostur og stór nýtsla av alkohol kunnu elva til álvarsligar sjúkur og fyri ov tíðligan deyða.

- Í okkara grannalondum er gransking innan hesi øki vanlig, og í Danmark eru tey í ár farin undir eina umfatandi kanning um livimátan hjá dønum. Hesa kanning kalla tey KRAM, sum eisini er ein stytting fyri tað sama sum í MARK. Føroyska kanningin er í smálutum gjørd eftir sama leisti sum hin danska, sigur Malan Egholm.

Kanningin verður skipað um alt landið, og byrjar í januar 2008 og heldur fram út á heystið. Eitt tilvildarligt úrval av fólki millum 40 og 70 ár verða boðin at luttaka. Tey, sum taka av, skulu svara einum spurnarblaði og verða likamskannað á ymsan hátt, eins og blóðroynd verður tikin.

- Spurnarblaðið roynir at lýsa tey meginumráði, sum henda kanning hevur fyri eygað, nevniliga kostin, likamsvirknið, roykivanar og rúsdrekkanýtslu. Harumframt verður spurt um sjálvupplivaða heilsu og um heilsustøðuna hjá tí einstaka í høvuðsheitum. Ætlanin er, at tey luttakandi sjálvi kunnu svara spurnarblaðnum á internetinum, men av tí at hendan skipanin ikki er tøk enn, verður byrjað við einari vanligari pappírsútgávu, sum vit síðani gera teldutøk, sigur Malan Egholm.

### Serlig játtan

Likamskanningin fatar um mátan av blóðtrýsti og pulsi, likamsvekt, feittprosent og hædd, miðju- og mjadnamát, lungafunktión, vøddastyrki, balansu og kondition.

- Ein blóðdropi verður tikin úr oyranum og kannaður á staðnum fyri blóðsukur, triglycerid, kolesterol, LDL og HDL. Til hesar royndir skulu fólk verða fastandi fyri at fáa besta úrslitið, sigu Malan Egholm.

Kanningin varar áleið hálvanannan tíma og endar við, at tann einstaki fær síni úrslit skrivað á serligt oyðiblað, sum eisini inniheldur serliga frágreiðing um markvirðið, og um hvat tey eiga at gera, um teirra úrslit eru uttan fyri normalvirðini.

Fyribyrgingarráðið hevur fingið serliga játtan frá Almanna- og heilsumálaráðnum til hetta átak, og eftir ætlan verður peningur eisini settur av til verkætlanina komandi fíggjarár.

Fyribyrgingarráðið hevur sett sjúkrarøktarfrøðingin, MPH Maluna Egholm í starv at standa fyri hesi verkætlan.

- Verkætlanin verður framd í samstarvi við Apoteksverkið og við kommunurnar í Føroyum. Eisini liggur í verkætlanarfrymlinum, at kommunurnar skulu hava ein virknan leiklut í hesum fólkaheilsuátaki. Til dømis hevur Fyribyrgingarráðið verið í samband við Tórshavnar Kommunu, sum hevur lovað at húsa verkætlanini fyri kommununa í Heinesens Húsi. Eisini hevur kommunan lovað at hjálpa til við hóskandi starvsfólkum, sum skulu leiðbeina borgarunum um hvørjar hentleikar kommunan ræður yvir, tá um likamsvenjing roykiavvenjing og líknandi viðvíkur, sigur Malan Egholm.

### Tilvildarlig nøvn

Ætlanin er í fyrsta umfari at kanna 2000 fólk. Tey eru býtt soleiðis út um landið: Tórshavnar Kommuna 1000, Suðuroy 200, Sandoy 100, Vágar 100, Eysturoy 300, Norðoyggjar 200 og Norðurstreym 100.

Verkætlanin er góðkend av Vísindasiðsemisnevndini og av Dátueftirlitinum. Landsfólkayvirlitið hevur tilvildarliga drigið úr skránni nøvn, bústað og føðingardag hjá fólki millum 40 og 70 ár, soleiðis at býtið verður sum omanfyri nevnt kring landið.

Av tí, at roknað verður við, at bert helvtin vil luttaka, verða í alt 4000 nøvn drigin úr skránni.

- Upplýsningarnar verða goymdar á teldu og viðgjørdar á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Tær verða goymdar við navni og ætlanin er ikki at forkoma teimum, tá verkætlanin er av, bæði tí hendan verkætlanin við tíðini kann gerast afturvendandi og fyri at møguleiki skal verða hjá granskarum í framtíðini at fylgja upp um heilsustøðana, sigur Malan Egholm.

Á tíðindafundinum meldaði Heðin Mortensen seg sum sjálvboðín royndarkanin. Hann fegnaðist um átakið og segði, at tosað varð nógv um hetta millum starvsfólkið hjá kommununi, tí fleiri teirra høvdu verið við til at royndarkoyrt skipanina.

Borgarstjórin helt fyri, at har vóru 40 ára gomul fólk farin niðan í Heinesens Hús og komin út aftur sum 70-ára gomul. Og hinvegin eisini.

- Hetta er eitt kærkomið tiltak, og kommunan vil fegin hjálpa til á allan hátt vit kunnu, segði Heðin Mortensen.